Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 25/00227 Broyting í almennu byggisamtyktini fyri øki D: Havnaøki

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 22.04.2025 | 2/25 | 25/00227-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2025 | 37/25 | 25/00227-1 |

# BROYTING Í ALMENNU BYGGISAMTYKTINI FYRI ØKI D: HAVNAØKI

**Málslýsing:**

Ætlanin er, at gera broyta almennu byggisamtyktin fyri øki D: Havnaøki hjá Eysturkommunu.

Verandi byggisamtykt er soljóðandi:

## § 10. Ásetingar fyri øki D: Havnaøki.

1. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við hesi
2. Byggistigið fyri havnaøki sum heild má ikki fara upp um 0,3
3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu verða hægri enn 8m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).
4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10m ella nærri aðrari bygging enn 5m.

Ætlaða broytingin fevnir um punkt 5 og 6, sum verða lagdar aftrat.

1. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við hesi.
2. Byggistigið fyri havnaøki sum heild má ikki fara upp um 0,3
3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu verða hægri enn 8m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).
4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10m ella nærri aðrari bygging enn 5m.
5. *Loyvi kann gevast til at gera goymslutunnlar inn í fjallið.*

| |
|---|
| 6. *Býraðið hevur heimild til at gera, ella geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið sum er lagt út sum havnaøkið á plankortinum.* |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum. |

**<u>Vinnunevndin 22. april 2025</u>**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 30. apríl 2025</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini